## Nýggj FIFA-góðkenning

Ovari vøllur í Gundadali í Havn hevur fingið FIFA góðkenning á øðrum sinni. Tað staðfestir Joseph S. Blatter, forseti í FIFA, í brævi til Tórshavnar kommunu um jólini, veit heimasíðani hjá kommununi, torshavn.fo, at siga. Góðkenningin, sum fyrstu ferð varð latin Tórshavnar kommunu í vár, er galdandi eitt ár í senn. Nýggja góðkenningin førir við sær at til og við 30. november 2009 kunnu altjóða dystir leikast á graslíkisvøllinum í Havn. FIFA góðkenningin setir samstundis Tórshavnar kommunu krøv at røkja vøllin væl, skal hann framhaldandi vera í fremstu røð, tá umrøður altjóða fótbóltsdystir. Hvørt ár metir FIFA um støðuna. Ovari vøllur í Gundadali í Havn er einasti graslíkisvøllur í Føroyum, sum lýkur krøvini hjá FIFA, og í ár hava NSÍ, HB og B36 spælt altjóða dyst á graslíkinum.



## Undri flytur upp

Stutt undan jólum fekk Undri FF boð um, at felagið spælir í triðbestu deildini í komandi kappingarári. B36, sum gjørdist nummar tvey í 3. deild, hevur longu lið í 2. deild, og Skála, sum gjørdist nummar trý, hevur borið seg undan at flyta upp. Tí verður tað ístaðin Undri, sum flytur upp í 2. deild saman við B71, sum vann kappingina í 3. deild.

# Steypafinalan verður á ólavsøku

**Fótbóltssambandið hevur gjørt avtalu við havnarfeløgini um, at steypafinalan 2009 verður spæld á ólavsøku**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at finaludysturin tey bæði seinastu árini hevur verið spældur á heysti, verður talan í 2009 aftur um ólavsøkufinalu.

Orsøkirnar til hetta eru tvinnar, sigur Sveinur Tróndarson, formaður í kappingarnevndini hjá FSF.

- Í fyrsta lagi verður kappingin í ár skipað soleiðis, at summarfrítíðin er frá seinast í juni til á leið 20. juli.

- Harnæst hevur UEFA eisini broytt sínar kappingardagar, soleiðis at seinna undankappingarumfar er liðugt longu 22. juli.

- Hetta ber við sær, at tað havnarfeløgini, sum jú eiga rættin at spæla í Gundadali á ólavsøku, neyvan hava nakran sum helst møguleika at spæla nakran steypadyst á ólavsøku. Vit hava tí havt fund við feløgini, og við teirra samtykki er nú greitt, at ólavsøkan aftur verður karmur um steypafinaluna, sigur Sveinur Tróndarson.

- Hendir tað so, at eitt føroyskt lið hevur spælt seg víðari til 3. umfarið í europiskum høpi, samstundis sum liðið skal spæla finalu á ólavsøku, standa vit sjálvandi við einum trupulleika. Men tá vildi eg sagt, at hetta er ein av tí heilt positiva slagnum, og so mugu vit taka støðu til hetta til ta tíð, sigur Sveinur Tróndarson.



*Eftir at finalan tvey ár á rað er spæld um heystið, verður tað nú aftur ólavsøkan, sum verður karmur um løgmansdystin. Ólavsøkudagur, 29. juli, verður aftur finaludagur í 2009*

| Premier League | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | vunnin | tapt | mál- | |
| | dystir | v | - | j | - | t | mál | mál | munur | stig |
| 1 Liverpool | 20 | 13 | - | 6 | - | 1 | 35 | 13 | 22 | 45 |
| 2 Chelsea | 20 | 12 | - | 6 | - | 2 | 40 | 9 | 31 | 42 |
| 3 Man Utd | 17 | 10 | - | 5 | - | 2 | 28 | 10 | 18 | 35 |
| 4 Arsenal | 20 | 10 | - | 5 | - | 5 | 33 | 23 | 10 | 35 |
| 5 Aston Villa | 19 | 10 | - | 5 | - | 4 | 32 | 22 | 10 | 35 |
| 6 Everton | 20 | 9 | - | 5 | - | 6 | 27 | 25 | 2 | 32 |
| 7 Wigan | 19 | 8 | - | 4 | - | 7 | 24 | 21 | 3 | 28 |
| 8 Hull | 19 | 7 | - | 6 | - | 6 | 28 | 36 | -8 | 27 |
| 9 Fulham | 19 | 6 | - | 8 | - | 5 | 18 | 14 | 4 | 26 |
| 10 West Ham | 20 | 7 | - | 4 | - | 9 | 24 | 28 | -4 | 25 |
| 11 Bolton | 20 | 7 | - | 2 | - | 11 | 22 | 28 | -6 | 23 |
| 12 Portsmouth | 20 | 6 | - | 5 | - | 9 | 21 | 33 | -12 | 23 |
| 13 Man City | 20 | 6 | - | 4 | - | 10 | 38 | 30 | 8 | 22 |
| 14 Newcastle | 20 | 5 | - | 7 | - | 8 | 26 | 32 | -6 | 22 |
| 15 Sunderland | 20 | 6 | - | 4 | - | 10 | 21 | 29 | -8 | 22 |
| 16 Tottenham | 20 | 5 | - | 5 | - | 10 | 20 | 25 | -5 | 20 |
| 17 Middlesbr. | 19 | 5 | - | 5 | - | 9 | 17 | 28 | -11 | 20 |
| 18 Stoke | 20 | 5 | - | 5 | - | 10 | 18 | 33 | -15 | 20 |
| 19 Blackburn | 20 | 4 | - | 6 | - | 10 | 22 | 36 | -14 | 18 |
| 20 WBA | 20 | 5 | - | 3 | - | 12 | 16 | 35 | -19 | 18 |

# Meistari bjóðar Christian Høgna av

**AB hevur keypt AaB álopsspælaran Simon Bræmer, sum harvið verður nýggjur kappingarneyti hjá Christian Høgna Jacobsen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Stutt fyri jól ljóðaði frá AB, sum hevur Christian Høgna Jacobsen millum álopsspælararnar, at felagið fór at keypa framrættaðar spælarar, sum hava víst, at teir eru førir fyri at standa seg í superliguni.




*Simon Bræmer hevur havt ilt við at vinna sær fast pláss á superliguliðnum hjá AaB, og hann sigur seg gleða seg til nýggju avbjóðingina í Frem*

Nú er fyrsta staðfestingin av at gera hesi orð til veruleika vorðin veruleiki. AB hevur í dag boðað frá, at felagið hevur keypt Simon Bræmer, sum hevur spælt við danska meistaraliðnum AaB, har sáttmálaskeiðið hjá honum verður liðugt nú á nýggjárinum.

Simon Bræmer hevur spælt 68 dystir á besta AaB liðnum, og hann hevur skorað 22 mál. Hann hevur spælt á U-16, U-18 og U-21 landsliðunum.

Nýggi kappingarneytin hjá Christiani Høgna Jacobsen fer til arbeiðis í AB beinanvegin eftir nýggjár, og hann sigur seg vera spentan:

- Eg skifti til AB, tí eg ynski at spæla á hægsta støði. Tað ljóðar kanska eitt sindur undarligt at skifta til AB, sum jú spælir í 1. deild. Men AB hevur sannførandi ætlan um, hvussu felagið ætlar longu í 2010 at verða partur av bestu deildini, sigur Simon Bræmer við heimasíðuna hjá AB.

- Leiðslan ynskir at fáa spælarar til felagið, sum hava møguleikar at standa seg í SAS liguni, og sum hava royndir av at spæla í bestu deildini. At teir hava skrivað undir sáttmála við meg vísir, at leiðslan tekur í álvara tað, sum teir hava sagt. Eg gleði meg heilt nógv til nýggju avbjóðingina, sigur Simon Bræmer, sum í heyst hevði ilt við at vinna sær fast pláss á besta AaB liðnum.